# Bygdarráðsfundur

## Hvalbiar Kommuna

**Dagfesting:** 06.09.2016 kl. 17.30

Á fundi: Trúgvi Gudmundarson
Rúni Thomsen
Magni Bertholdsen
Eyðfinn Debes
Martin í Nesi
Niels J. Thomsen
Jóhan Eli Poulsen

Ikki møtt:

Skrivari: Johanna B. Djurhuus

Rúni Thomsen luttók ikki í viðgerðini av máli nr. 1.

1. **Umsókn um fíggjarligan stuðul frá Skótaliði Einar Suðrings.**
   Samtykt varð einmælt at stuðla við kr. 20.000,-.

2. **Umsókn um stuðul í sambandi við 200 ára hald í Sandvík.**
   Í sambandi við fyrireiking til 200 ára hald í Sandvík, verður søkt um stuðul til tiltakið. Samtykt varð einmælt, at Hvalbiar Kommuna rindar fyri mat, tilfar o.a., sum tiltakið kostar upp til kr. 25.000,-.

3. **Umsókn um stuðul til ársskeið.**
   Samtykt varð einmælt ikki at stuðla.

4. **Umsókn um marknaumskipan millum matr. nr. 95f og 19l og samanl. av matr. nr. 19l og 95c.**
   Samtykt varð einmælt at viðmæla umsóknunum um marknaumskipan og samanlegging.

5. **Frágreiðing / áheitan frá heilsufrøðinginum í Hvalbiar skúla.**
   Samtykt varð at heita á heilsufrøðingin um at koma á fund við bygdarráðið, møguliga saman við skúlastýrinum.

6. **Tilboð uppá uppstigan av bókhaldsskipanini Lundanum frá Nema.**
   Tilboðið frá Nema umfatar m.a. innstallering av nýggja Lundanum á lokala servaran og konvertering av øllum bókingum frá 2009 til d.d. Samtykt varð einmælt at taka av tilboðnum frá Nema á kr. 24.500,- uttan MVG.

7. **Kunning um hvørji mál eru beind í nevnd síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd:**
   - Umsókn um byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 56b, Hvalba.

   **Vega- og havnanevnd:**
   - Skriv um asfalt á tún.

8. **Kunning um málsviðgerð síðani síðsta fund.**
   **Tekniska nevnd (framløga Magni Bertholdsen):**
   - Byggiloyvi til bilhús á matr. nr. 56b: Samtykt varð einmælt at geva byggiloyvi til bilhús sambært umsókn, tekningum og givnum upplýsingum.

   **Vega- og havnanevnd (framløga Eyðfinn Debes):**
   - Asfalt á tún: Samtykt varð einmælt at siga frá, at Hvalbiar Kommuna á fundi tann 06.03.2014 hevur samtykt ikki at asfaltera tún, innkoyringar o.a. hjá privatfólki.

9. **Ikki almenn mál:**
   3 mál vórðu viðgjørd fyri afturlatnum hurðum.

Fundarbókin lisin og skrivað undir. Fundur lokin kl. 20.30

Trúgvi Gudmundarson Rúni Thomsen Magni Bertholdsen

Eyðfinn Debes Martin í Nesi Niels Jacob Thomsen Jóhan Eli Poulsen